# Nólsoy verður enn grønari

**Komandi summar verður støða tikin til, um ein norðurlendsk royndarverkætlan skal setast í verk í Nólsoy. Gongst sum ætlað, so skal Nólsoyggin fáa allan sín orkutørv frá varandi orkukeldum**

ORKA
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Fyri einum mánaði síðani varð ein vindmátari settur upp í Nólsoy, og har skal hann standa komandi árið. Tað er smápartafelagið Røkt og danski granskingarstovnurin Risø, sum standa fyri mátingarnar. Røkt er felagið, sum framleiðir streym úr vindmyllunum í Vestmanna, og letir streymin inn á netið hjá SEV.

Í gjár var ein kunnandi fundur í Nólsoy um orkuverkætlanina. Í Nólsoy eru tey ógvuliga spent uppá hetta, og áhugin sást eisini aftur á fundinum - eini 40 fólk vóru uppmøtt.

Fundurin varð brúktur til at greiða frá ymsum skipanum, sum kunnu gera seg galdandi í mun til orkutørvin í bygdini. Eisini varð komið inn á, hvussu skúlin kann gerast partur av verkætlanini, umframt at fólkið varð kunnað um lokalar royndir við varandi orku sum ískoyti í vanliga húsarhaldinum.

### Til alla oynna

Verkætlanin er skipað í trimum fasum. Fyrsta fasan fór við at velja hvar verkætlanin skuldi vera, kortleggja orkubrúk og tílíkt. Nú eru vit so komin til aðru fasu, og tað var tí Bjarti Thomsen, Bjarni Djurholm, Súsanna Sørensen, Kristen Strømmen, Dávur Juul Magnussen, Hilmar Joensen og Jógvan Thomsen greiddu frá á fundinum í skúlanum í gjár.

Onnur fasan verður millum annað brúkt til at gera vindmátingar og skráseta orkubrúkið í Nólsoy, og her er mann komin fram til, at myllurnar í Neshaganum og omanfyri Vestmanna ikki eru nóg stórar. Tær framleiða 660 watt, men fyribilskanningarnar vísa, at ein mylla, sum klárar at framleiða eitt megawatt helst hevði verið rættara støddin.

### Ritan á hydrogen

Tá tosað verður um varandi orku í Føroyum, fellur tosið altíð inn á vindmyllur. Hetta er eisini tað, sum nógv av tosinum snýr seg um í Nólsoy fyri tíðina, men ikki bara. Á fundinum í gjár var eisini hydrogen nevnt sum orkuveitari. Hetta er nakað sum verður mett at verða ógvuliga áhugavert, og víst var til Íslands, har tey í eitt ár nú hava havt bussar koyrandi, sum hava nýtt hydrogen. So mikið ítøkiligt er tað við hydrogentosinum, at Bjarni Djurholm nevndi, at tey í Innlendismálaráðnum høvdu tosað um, at nýggja Ritan, sum skal byggjast í næstum, skal brúka hydrogen.

Og Nólsoyggin fyllir nógv í Innlendismálaráðnum. So mikið nógv, at teir hava sett ein mann at arbeiða við hesum burturav. Tað er Dávur Juul Magnussen, og tað var eisini hann sum saman við einum norðmanni, sum var maðurin aftanfyri fundin í gjár.



*Ein tilgjørd mynd við eini vindmyllu í Nólsoynni* *Mynd: Bjarti Thomsen*



*Dávur Juul Magnussen og Kristen Strømmen vóru menninir aftanfyri fundin í gjár*



*Eini 40 fólk vóru møtt til fundin í skúlanum í gjár*

# Hotel Eiði fingið nýggjar eigarar

**Hotel Eiði, sum seinastu árini er rikið av Hans Jørgen Nielsen og Jóhonnu Nielsen, hevur fingið nýggjar eigarar. Malan Rubeksen, Herjón Olsen, Anfinn Kruse og Jóhan K. Joensen hava keypt hotellið fyri 3,7 milliónir krónir.**

HOTEL EIÐI
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Tað eru tríggir eiðismenn og ein havnadama, sum eru nýggju eigararnir. - Tá Herjón og eg spurdu okkum fyri, og høvdu ætlanir um at keypa, settu Anfinn Kruse og Jóhan K. Joensen seg í samband við okkum, og vit gjørdu av at sláa okkum saman um keypið, greiðir Malan Rubeksen frá. - Tað hevur longi verið ein dreymur okkara. Eg havi drúgvar hotelroyndir av Hafnia, og Herjón hevur verið skipskokkur longi, so tí meta vit okkum at vera før fyri at fara undir uppgávuna

Tá tú kemur koyrandi til Eiðis, er eitt tað fyrsta eygað ber við, stóra hotellið, sum liggur ovarlaga í bygdini. Seinastu tíðina hevur tað ikki verið nakað serliga pent á at lýta, tí at kalla ongin máling er á bygninginum. Men hetta er bert ein partur av renoveringsætlanunum hjá nýggju eigarunum. - Uttanfyri skal málast og hampast um, og innanfyri verða eisini stórar broytingar. Vit ætla at kundin skal merkja, at hotellið hevur fingið nýggjar eigarar, sigur Malan Rubeksen.

### Broytingar at síggja

Ein av broytingunum verður, at hotellið altíð fer at hava opið.

– Vit ætla at fólk altíð skal kunna koma inn, og fáa sær ein bita ella eitt krúss av kaffi. Bygdafólkið skal veruliga merkja, at eitt hotel er í bygdini, og vit vilja gjarna gera okkurt fyri bygdina, fortelur Malan Rubeksen, sum eisini greiður frá øðrum broytingum, sum eru ávegis, og aðrar sum arbeitt verður við.

– Matarskráin verður a la carte, og vit hava eisini bílagt okkum eina ísbarr. Vit fara at hava eina fjølbroytta kaffiskrá, við nógvum ymiskum sløgum av kaffi, umframt kakur av ymsum slag, eisini heimabakstur.

Eitt annað, sum kundin, og serliga tey í matstovuni fara at merkja er, at ein spælikrókur eisini kemur at vera, tá hotellið letur upp. Soleiðis fara øll at kunnu nýta matin í frið og náðum.

### Søkt um skeinkiloyvi

Eitt, sum enn ikki er komið í rætt lag enn, men vónandi kemur upp á pláss áðrenn alt ov langa tíð, er skeinkiloyvi.

– Vit hava søkt um skeinkiloyvi, og vóna at tað kemur í rætt lag innan ikki alt ov langa tíð, greiðir Malan frá, sum eisini vísir á, at tey hava ætlanir um at gera hotellið brúkiligt hjá rørslutarnaðum, tí sum er fáa tey ikki brúkt tað.

Í løtuni arbeiða tey á hotellinum av øllum alvi, fyri at fáa alt klárt til reseptiónina, sum verður mánadagin 15. mai. Av fyrstan tíð hevur hotellið havt navnið Hotel Eiði. Men undanfarnu broyttu navnið til Hotel Lonin. Hetta verður við nýggju eigarunum broytt, so nú eitur hotellið aftur Hotel Eiði.

Um tíggju dagar verður so reseptiónin, og aftaná tað fer Hotel Eiði, sum kostaði 3,7 milliónir, at lata upp fyri almenninginum.

HÁRFRÍÐKANARHØLLIN
Angelie er byrjað hjá okkum



Upplatingartíðir:
Mán. - hós. 9.00 - 17.00 - Frí. 9.00 - 18.00 - Leyg. 9.00 - 13-00
HÁRFRÍÐKANARHØLLIN
TEL 31 34 49 • HOYDALSVEGUR 40
SIRI ANN - ANNIKA - ANN
LYDIA - ANGELIE - MARITA
Sosialurin 341800